[ November ]

# Føroyskt stál í Premier League

**Tað var tann stóri dreymurin, sum gjørdist veruleiki, tá ið ungi føroyski fótbóltsspælarin Ingi Højsted skrivaði undir sáttmála við enska felagið Birmingham City. Nýggir liðfelagir hjá Inga eru nú Emile Heskey, Nicky Butt og Mikael Forsell**




*– Eg ætli mær at vinna pláss á Premier League liðnum. Sjálvandi verður tað ikki lætt, tí har eru jú nógvir um boðið. Men tað er jú tað, sum er endamálið við hesum. Og í øllum førum skulu teir so síggja, at eg kann styrkja um hópin, sigur Ingi Højsted, sum nú spælir við Birmingham City*

So er stóri dreymurin veruleiki. Ingi Højsted hevur skrivað undir sáttmála við enska Premier League-felagið Birmingham City.

Sjálvur var Ingi Højsted fyrsti føroyingurin, sum fekk snoddað til enska fótbólt, tá hann í 2001 gjørdi lærlingasáttmála við Arsenal. Ein slóð, sum Johan Troest Davidsen og Christian Restorff Mouritsen síðani hava fylgt í ávíkavist Everton og Manchester City.

Men hesa ferð er talan ikki um lærlingasáttmála. Ingi Højsted hevur nevnliga gjørt fulltíðar yrkissáttmála við Birmingham í ensku Premier League, og soleiðis skal hann á jøvnum føti við allar aðrar spælarar í felagnum dystast um eitt pláss millum teir fyrstu ellivu. Lønina vil hann ikki tosa um, men sambært umboðsmanni hansara, so man hon ikki vera heilt av leið.

– Vit fara sjálvandi ikki at siga nøkur tøl. Men gongur tað væl hjá Inga á vøllinum, so kemur hetta øllum pørtum til góðar, ljóðar staðfestingin frá Jákupi í Stórustovu.

**Bíðitíðin kann vera frustrerandi**

Tað hevur frá nógvum síðum verið roknað sum givið, at tíðin hjá Inga í føroyskum fótbólti mest sum var upp á lænta tíð. Hetta var eisini nakað, sum Kristjan á Neystabø, stjóri í FC Tórshavn, sum rekur besta B36-liðið, ásannaði á tíðindafundinum.

– Soleiðis sum Ingi hevur spælt í ár, so var tað nokk bara ein spurningur um tíð. Ikki minst eftir útidystin móti FC Midtjylland, tá flestu miðlarnir skýrdu hann at vera besta mann á vøllinum. Tað haldi eg eisini staðfesti, hvussu stórar kvalitetir Ingi hevur sum spælari, og tí vistu vit av, at hann mest sannlíkt fór uttanlands aftur.

Og sjálvur tykist Ingi eisini vera fegin um hetta árið, sum hann nú aftur hevur havt í B36.

– Tá eg kom aftur, so vildi eg fyrst og fremst sleppa at spæla dystir aftur. Eg hevði verið nógv skaddur, og tí ráddi fyrst og fremst um at koma ígongd. Og at tað hevur gingið somikið væl, kann eg bara fegnast um. Eg havi eisini bitið meg fastan á landsliðnum, og havi at kalla einki sum helst merkt til skaðan, sum áhaldandi plágaði meg í Arsenal.

– Hinvegin hevur málið alla tíðina verið, at eg skuldi sleppa uttanlands aftur.

**Málið er Premier League**

Serliga síðani summarsteðgin hava gitingarnar um tína framtíð verið nógvar. Hevur tað ikki verið frustrerandi til tíðir?

– Tað er jú altíð soleiðis, at tað tekur tíð, tá slík mál skulu avgreiðast. Men talan hevur verið um hampuliga nógvar fyrispurningar, og tí hevur tað í løtum verið heldur frustrerandi. Hinvegin havi eg sjálvur bara roynt at verið tolin og arbeitt hart, staðfestir hann.

Í fyrstu atløgu er talan um sáttmála fram til 30. juni 2006, og innan hesa tíð skal Ingi so sannføra um, at hann er ein maður, sum Birmingham kann fáa gagn av í framtíðini.

Hetta kann kanska leggja eitt trýst á spælaran, men sjálvur tykist Ingi vera fullgreiðir um, hvørji mál hann ætlar sær at røkka komandi sjey mánaðirnar.

– Eg ætli mær at vinna pláss á Premier League liðnum. Sjálvandi verður tað ikki lætt, tí har eru jú nógvir um boðið. Men tað er jú tað, sum er endamálið við hesum. Og í øllum førum skulu teir so síggja, at eg kann styrkja um hópin, sigur Ingi Højsted.

» Sært tú, tað er nakað serstakt við Sumbiarhjartanum. Tað er, sum um eg ongatíð havi merkt, at eg havi nakað hjartað. Eitt slíkt hjarta úr Sumba, tað er har bara. Tað er øgiliga sterkt, slær tá tað skal og er eisini sera áhaldið og treyst, skal eg siga tær. Soleiðis er tað bara! «

*– Emil Juul Thomsen, bókaútgevari*

» Tað hevur ómetaliga stóran týdning fyri menningina av fótbóltinum, at stórar tjóðir vitja smærri tjóðir. Tá ið til dømis franska landsliðið kemur her til Føroya at spæla, er tað jú ein stórhending, ið ger so ómetaliga nógv gott fyri áhugan fyri fótbólti her á landi. «

*- Michel Platini, fronsk fótbóltshetja vitjar í Føroyum*

**Sólja í Ólavsstovu verður vald til nýggjan umboðsmann hjá løgtinginum. Hon loysir Joen H. Andreassen av í starvinum.**

## Vánligasti bilførarin

Elin Christensen av Skála hevur ivaleyst Danmarksmet í dumping í teoriroynd. Elin Christensen var við í finaluni í sjónvarpssendingini "Danmarks Værste Bilist" og gjørdist stóri taparin – ella vinnarin. Hon varð sostatt útrópt til vánaligasta bilførara í Danmark. Elin fekk koyrikort í Føroyum fyri 31 árum síðan, og tað kundi tykst sum um, hetta var eitt mistak. Í sendingini var hon uppi í teori. Hon hevði 22 felir av 25 møguligum.

– Hetta hevur verið ordiliga stuttligt og ikki minst, eri eg ivaleyst tann, sum hevur fingið mest burtur úr við at gerast betri bilførari. Eg hevði uttan at blunkað valt at luttikið aftur, sigur Elin.

## 100.000 í eina nátt

Tað var vorðið sum fongur, ið Páll Højgaard og Janus Fossdalsá fingu á línuni ein mikudag tíðliga í november mánaði. So nógv rúgvaði fiskurin upp í glastrevjabátinum, at teir vóru noyddir at biðja ein annan bát læna sær kør.Men hetta var heldur ikki nóg mikið til at rúma øllum fiskinum. Lastin var á tremur, fýra kør stóðu full á dekkinum, og haraftrat høvdu teir leysan fisk í bátinum. Á 35 línum høvdu teir fiskað millum 11.000 og 12.000 pund, og tað kundi seljast fyri millum 80.000 og 100.000 krónur.

## Bersøgin rithøvundur

Nýggja skaldsøgan hjá Jóanes Nielsen, Glansbílætasamlararnir, er uttan samanbering tann mest bersøgna, sum yvirhøvur er skrivað á føroyskum. Fyri høvundan er hon ein endurspegling av lívinum, tá tú velur at siga onkrar av sannleikunum.

– Tað tykist sum, at tá tú koyrir gardinurnar frá í lívinum, líka mikið hjá hvørjum, so finnur tú oftast okkurt maðkareiður. Tá man skrivar eina bók sum hesa og rópar seg hartil ein realistiskan høvund, so má man taka alt tað við, sum hoyrir tí veruliga heiminum til. Eg kann ikki loyva mærat sita og redigera, so at eitt glansbílæt kemur fram, sigur Jóanes Nielsen.